# Poppkorn

## BESTI NÝGGI



Bólkurin PoppKorn er eitt eindømi í føroyskari tónleikasøgu. Hann er fyrsti gentupoppbólkur nakrantíð. Bólkurin hevur í ár spælt á festivalum og konsertum kring Føroyar.

Poppkorn er fimm ungar gentir av Sandi, men aftan fyri genturnar situr Føroya mætasti poppsmiður Kári Jacobsen. Kári livir av at skriva tónleik og skrivar javnan tónleik til nógv útlendsk nøvn og sjónvarpsrásir. Poppkorn er Kárasa verkætlan og hetta hoyrist aftur. Kári hevur skrivað orð og løg á 9 av teimum 10 løgunum. Hitt lagið er "Sjeikurin" hjá Elin Heinesen, ið lá nummar eitt á fimtan teimum bestu. Fyrsta fløgan hjá bólkinum kom út beint fyri jól, og megnaði uppá fáar vikur at gerast triðjmest selda fløga á sølulistanum hjá 3'aranum.

Atkvøða: Send »pla bn 4« til 1441

# The Dreams

## BESTI NÝGGI



Punkrokkbólkurin úr Havn er tann fyrsti føroyski bólkurin, sum av álvara er sloppin fram at á tónleikarásini MTV. Bólkurin varð valdur til at verða við í kappingini The A Cut, og har stóðu teir seg heilt væl, hóast teir vórðu soldaðir frá móti endanum av kappingini.

Tríggir tónleikarar eru í The Dreams, og teir spæla lívligan rokktónleik, sum er á tann punkkenda bógvin. Bólkurin hevur eitt lítið ár á baki, men hann hevur longu gjørt vart við seg í føroyskum tónleiki. Eftir at bólkurin var komin inn í hitan á MTV, vóru boð eftir honum til føroysku tónleikafestivalarnar í summar, og The Dreams spældi bæði á Jóansøkufestivalinum, G! Festivalinum og á Summar Festivalinum, umframt at bólkurin hevur spælt á øðrum konsertum. The Dreams er eitt spennandi og ungt navn í føroyskum tónleiki.

Atkvøða: Send «pla bn 5« til 1441

# Janus Rasmussen

## BESTI SANGARI



Karismatiski sangarin í feel good bólkinum Lama Sea, Janus Rasmussen, hevur í ár sligið sítt navn fæst, sum ein lívligur, góður, stuttligur og garrvillur sangari. Hann er ein sonn orkubumba á einum palli og eigur ein stóran leiklut í, at Lama Sea nú telist millum best dámdu føroysku bólkarnar.

Janus Rasmussen gjørdi fyrstu ferð vart við seg í bólkinum Speaker í Prix Føroyum 2003, men tað var í ár við Lama Sea, at hann gjørdist ein veruliga stjørna. Lama Sea er í uppskoti til planetir fyri besta bólk og besta nýggja bólk. Janus Rasmussen syngur eisini í lýsingarbólkinum The Message.

Atkvøða: Send »pla bs 2« til 1441

# Petur Pólson

## BESTI NÝGGI



Peturi skapa eina myrka og vakra ljóðmynd.

Petur Pólson hevur verið virkin í føroyskum tónleiki í nógv ár í bólkum sum Visible Fish og Clickhaze. Petur var í 1999 oddamaður í tveimum bólkum í Prix Føroyar finaluni, og í 2001 vann hann Prix Føroyar við Clickhaze. Í ár hevur Petur á fyrsta sinni verið at hoyra solo. Hetta hevur, sambært Peturi sjálvum, givið honum nógv leysari teymar til at gera tað ,sum hann hevur hug til. Við sær í bólkinum hevur Petur royndar og dugnaligar tónleikarar, ið saman við

Petur vann M.A. Jacobsens virðislønina fyri fagrar bókmentir í 1997. Hetta er stutt sagt ein listarmaður, ið einki hevur at prógva.

Atkvøða: Send »pla bn 3« til 1441

# Teitur Lassen

## BESTI SANGARI



Fáur føroyskur tónleikari hevur verið so áhaldandi og treiskur sum Teitur Lassen í arbeiðnum fyri at gerast tónleikari burturav. Hann hevur í fleiri ár ferðast úti í heimi við sínum tónleiki, og tað gav eisini úrslit, tá ið stóra plátufelagið Universal gjørdi ein sáttmála við hann. Teitur byrjaði sum popptónleikari í Havn, og hann var sangari í væl umtókta bólkinum Mark No Limits, sum millum annað vann Prix Føroyar tónleikakappingina. Seinnu árini hevur hann spælt undir sínum egna navni, og hann hevur ikki minst verið á ferð í USA, men eisini á okkara leiðum í Norðurlondum og Europa annars. Higartil er ein fløga komin út á plátufelagnum Universal, men meira er í væntu. Teitur skrivar sínar egnu sangir, og teir eru hugtakandi við góðum yrkingum og fangandi løgum.

Atkvøða: Send »pla bs 5« til 1441

# Kári Sverrisson

## BESTI SANGARI



Eru vit til, spurdi Kári Sverrisson í sanginum, sum hann skrivaði til kappingina hjá Amnesty International fyri sløkum 15 árum síðani. Tað var tað fyrsta, sum føroyingar veruliga hoyrdu til sangskrivaran og sangaran Kára Sverrisson. Nøkur ár frammanundan gjørdi hann nógv við at vera málmaður í fótbólti, men hann læt seg úr handskunum og tók heldur gittar hond. Kári var sentralur limur í tónleikabólkinum Enekk, sum var ein nýskapandi fólkatónleikarabólkur, og millum og eftir útgávur hjá Enekk hevur Kári Sverrisson spælt sum solistur. Hann hevur javnan framførslur við tónleiki hjá sær sjálvum og øðrum. Hann er ein gávaður og nýskapandi sangskrivari, sum telist millum teir størstu vísusangararnar, sum Føroyar hava átt.

Atkvøða: Send »pla bs 3« til 1441

# Kim Hansen

## BESTI SANGARI



Nólsoyingurin Kim Hansen man vera ein av best umtóktu sangarunum í landinum. Dugnaligi popptónleikarin telist millum okkara bestu tónleikarar, og hann er ein framúr góður sangari. Hann kann tulka teir vakrastu sangirnar, so at teir fáa nýtt lív, og hann fáa tann lætta popptónleikin og bukandi rokktónleikin at svinga sum fáur. Í fjør gav Kim Hansen út eina savnsfløgu við øllum teimum mongu sangunum, sum hann hevði sungið í ymsum samanhangum. Úrvalið er imponerandi og hugtakandi. Alt frá stóra hittinum um Mariu til jólasangir, fótbóltssangir og poppsangir. Fløgan gjørdist mest selda fløga hjá 3'aranum í fjør. Á palli hevur Kim Hansen verið sera virkin – bæði sum solistur, men serliga í tónleikabólkum – og í løtuni er ein hann ein av limunum í vælspælandi bólkinum Showmonnum.

Atkvøða: Send »pla bs 4« til 1441

# Brandur Karlson Jacobsen

## BESTI SANGARI



Í fjør kom ein sangari afturíaftur, sum tað ikki hevði verið so nógv at hoyrt í fleiri ár. 30 ára gamli runavíkingurin Brandur Karlson Jacobsen plagdi at verða virkin í føroyskum tónleiki, og hann var millum annað við í rokkbólkinum Ikaros, sum spældi eitt skifti í 90'unum. Men í fleiri ár hevur hann ikki framført nakað serligt alment, og tað var tí talan um eitt lítið comeback, tá ið hann var við í singer/songwriter kappingini. Har gekk tað so væl, at Brandur gjørdist tryggur vinnari av kappingini. Sosialurin skrivaði, at Brandur var í einum flokki fyri seg í finaluni. Brandur skrivar sjálvur sangir, og tónleikurin hjá honum er fólkakendur popptónleikur.

Atkvøða: Send »pla bs 1« til 1441

# Madonna



## BESTI ÚTLENDSKI

Madonna verður roknað sum poppdrotningin í løtuni. Songkvinnan, sum er farin at nærkast teimum fimmti, er framvegis virkin, dagførd og spennandi. Hon kom av álvara fram í 1984, tá ið fyrsti sangurin hjá henni kom inn um topp-10 í USA. Síðani hevði hon 17 fylgjandi sangir, sum allir komu fram millum 10 tær bestu singlurnar á amerikanska singlehitlistanum. Tá ið sangurin Like A Virgin gjørdist nummar 1 í USA í 1984, var grundarlagið lagt undir statusið sum heimsstjørna. Men hóast tað eru gingin 20 ár síðani gjøgnumbrotið, er Madonna framvegis millum stóru songkvinnurnar í heiminum. Hon hevur júst havt eitt heimshitt við sanginum Hung Up, og hon er alt annað enn ferdig sum poppsangari. Sagt verður, at Madonna varð fyrsta kvinnan, sum hevði fult tamarhald á sínum egna tónleiki og image – ein sterk listakvinna, sum dugir at gera popptónleik til eina breiða áhoyrarafjøld.

Atkvøða: Send »pla ub 3« til 1441

# James Blunt

## BESTI ÚTLENDSKI



Ein yrkisleið innanfyri bretska herin tóktist meira sannlík enn lívið sum poppstjørna fyri nøkrum árum síðani. James Blunt kemur úr eini familju, sum hevur traditiónir innan bretska herin, og hann gjørdi sjálvur tænstu sum NATO-hermaður í Kosovo. Men eftir fýra ár í herinum tók hann fetið inn í tónleikaheimin, og í 2003 fekk hann sáttmála við plátufelagið Custard Label. Í 2005 kom fyrsta fløgan hjá James Blunt, og hon kallast Back To Bedlam. Útgávan fekk rættiligan vind í seglini, tá ið fyrsta stakfløgan, You're Beautiful, streyk upp á bretska tónatindin og var liggjandi sum nummar 1 á singlehitlistanum í fimm vikur. Sangurin gjørdist eisini eitt hitt kring Evropa – eisini í Føroyum – og síðani hevur James Blunt verið roknaður sum eitt av teimum mest spennandi nýggju nøvnunum í evropeiskum popptónleiki.

Atkvøða: Send »pla ub 2« til 1441

# Tim Christensen

## BESTI ÚTLENDSKI



Tim Christensen telist millum teir týðandi limirnar í nýggjari donskum rokktónleiki.

Sangarin og tónleikarin úr Espergærde var limur í tiltikna danska rokkbólkinum Dizzy Mizz Lizzy, sum var virkin í árunum frá 1988 og fram til 1998. Tim Christensen hevur, síðani Dizzy Mizz Lizzy gavst at spæla, roynt seg á egnum veingjum, og tað við góðum úrslitum. Hann hevur skrivað sangir, givið tónleik út og spælt á konsertum í Danmark og aðrastaðni. Tann sangurin hjá Tim Christensen, sum tann breiða fjøldin kennir best, má vera sangurin, sum hann skrivaði til donsku sjónvarpsrøðina Nicolaj og Julie – Right Next To The Right One. Men Tim Christensen er nógv meira enn tað, og hann er framvegis ein virdur rokktónleikari í Danmark – og í Føroyum.

Atkvøða: Send »pla ub 5« til 1441

# Nephew

## BESTI ÚTLENDSKI



Nephew var eitt av høvuðsnøvnunum á G! 2005. Bólkurin fekk veruliga áskoðarafjøldina á kók. Hetta sást eisini aftur á 15 teimum bestu, har bólkurin fekk tvey løg á listan yvir ársins best dámdu løg: En Wannabe Darth Vader á fjórða plássi og Worst & Best Case Scenario á sekstanda plássi. Eisini á danska Tjecklistanum klárar Nephew seg væl við Worst & Best Case Scenario, sum ársins best dámda lagi, og tveimum øðrum løgum somuleiðis á listanum.

Nephew við hálva gøtumanninum Simon Kvamm á odda, er eitt tað størsta navnið í donskum tónleiki í løtuni. Nephew hevur verið til síðan 1996, men fekk ikki veruliga gjøgnumbrot fyrr enn Simon Kvamm gjørdist kendur úr Drengene Fra Angorra. Fløgan USA/DSB var á tremur við landaplágum.

Atkvøða: Send »pla ub 4« til 1441

# Green Day

## BESTI ÚTLENDSKI



Í 2005 vóru tíggju ár fráliðin, síðan Green Day gav fyrstu fløguni Dookie út. Hetta er bólkurin, ið byrjaði alt hatta við popppunki, fleiri ár áðrenn Blink 182 og Sum 41 vóru til.

Á nýggjastu fløguni American Idiot vísir Green Day, at bólkurin er vorðin vaksin. Tónlistarliga er talan um frálíkan rokktónleik. Men samstundis er politiski boðskapurin vorðin nógv harðari og meira beinrakin. Fløgan er ein beinleiðis framman á til Georg Bush og høgra vongin í amerikanskum politikki.

American Idiot hevur fingið eina fantastiska móttøku við eini røð av hittløgum og heiðurslønum kring allan heim.

Atkvøða: Send »pla ub 1« til 1441